Oyggjablaðið



# Býráðsskrivari bitin av



*Jákup Frants Larsen hevur stóran áhuga fyri modellbilum, men hann hevur eisini áhuga fyri modellum av motorsúklum, bátum og skipum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Ein av teimum 700-800 modellbilunum, sum Jákup Frants Larsen eigur, hevur sín uppruna úr Chili, har Salvador Alliende í sínari tíð setti á stovn eina verksmiðju at gera modellbilar við hond fyri at skapa arbeiði. – Eg helt hetta vera lygn, tá seljarin segði mær hesa søgu, men tað vísti seg, at alt var rætt, sigur hann**

Vilmund Jacobsen

Sum 9 ára gamal byrjaði Jákup Frants Larsen, sum í mong ár hevur verið skrivari hjá Fuglafjarðar kommunu, at savna modellbilar og modell av motorsúklum. Øll hesi ár hevur hann lagt aftrat savninum, og tað eru serliga bilarnar, hann hevur havt alstóran áhuga í.

– Hetta eru alt bilar, sum eru framleiddir av góðkendum framleiðarum, og støddirnar eru ymiskar. Bilarnir eru í lutføllunum, 1-12, 1-18, 1-24 og 1-43 í mun til uppruna bilarnar.

Í dag hevur Jákup Frants ikki talið á øllum teimum bilum, hann eigur, men hann metir, at hesir eru einir 700-800 í tali.

– Eg byrjaði ikki at savna modellir av motorsúklum fyrr enn í sjeytiárunum, og av hesum eigi eg ikki nær til so nógvar sum bilarnar. Súklurnar røkka heldur ikki so langt aftur, kanska aftur til fimmtiárini, leggur hann aftrat.

## Gamalt og nýtt

Jákup Frants Larsen sigur, at elstu bilmodellini, hann hevur savnað, er eftirlíkningar av bilum, sum koyrdu í 1890-unum.

– Talan er um øll møgulig bilmerki, og eg trúgvi, at eg eigi modellir av flestu bilmerkjum. Eg havi soleiðis gjøgnum hesi mongu ár keypt modellbilar, og nógvir av hesum eru sera flottir, ikki minst bilarnir, sum komu í 1930-unum.

Hann sigur, at nakrir bilar eru keyptir í Føroyum, men teir allar flestu eru keyptir uttanlands.

– Eg havi tó funnið onkran hendinga bil í Føroyum, og í onkrum føri vistu tey, sum seldu bilin, ikki, at hesin var øðrvísi enn aðrir. Soleiðis havi eg keypt onkran bil í BR, har tey slett ikki vistu, hvussu serstakur júst hesi bilurin var.

Jákup Frants Larsen keypir ikki bara fyri at keypa. Hetta skulu vera góðkendir og dygdargóðir bilar, og hann hyggur eitt nú eftir, hvør framleiðarin er. Flestu bilarnir eru framleiddir í Evropa, eitt nú í Belgia og Italia.

– Eg haldi, at ein av bilunum í mínum savni er komin úr Eysturevropa, sigur hann.

Hann sigur, at onkur føroyingur, sum veit um savnið, gjøgnum árini eisini hevur ringt til hansara og er komin við onkrum bili.

– Soleiðis havi eg eisini fingið onkrar heilt serstakar bilar, leggur hann aftrat.

## Serstakir bilar

Jákup Frants Larsen sigur, at nógvir av bilunum eru keyptir í Danmark, har tey hava hús og hava ferðast nógv. Kona hansara, sum er ættleidd til Føroya, hevur systkin niðri.

– Okkum dámar væl at koma av landinum av og á, og tá vit eru í Danmark, plagi eg at ganga á ymisk miðir, sum eg havi. Eg keypi ongan bil á netinum, sigur Jákup Frants Larsen.

Hann minnist soleiðis aftur á ein, hann hitti í Danmark.

– Her stóð ein modellbilur til sølu fyri einar 2.000 krónur, men eg helt tað vera ov dýrt. Seljarin segði, at hetta var ein av fáu bilunum av hesum slag, sum vóru eftir í Danmark, og tí var bilurin rættiliga serstakur.

Men søgan um hendan bilin er betri enn hetta.

– Seljarin segði mær eisini, at bilurin stavar frá tíðini hjá Salvador Alliende í Chili. Tá arbeiðsloysið var stórt, var verksmiðjan, sum hann tá setti á stovn at framleiða hesar modellbilarnar, ein liður í arbeiðsskapandi tiltøkum. Alliende fekk tá nøkur fólk at framleiða hondgjørdar modellbilar – og hesin

**» At eg kom á listan til eitt bygdaráðsval var ímóti mínum vilja, og eg heitti á familjuna um ikki at velja meg**

JÁKUP FRANTS LARSEN